gult cyan magenta svart






# HB tekur ein dyst í senn

*Í HB vilja tey als ikki tosa um eitt møguligt gullmerki enn. Menn royna ístaðin at hugsa um ein dyst í senn*



*Fyrri dysturin millum liðini bæði endaði við 2-1 sigri til HB, og teir reyð/svørtu hava helst einki ímóti einari endurtøku av hesum úrslitinum*

JÁKUP MØRK

Fyri mong hevur HB verið tað stóra positiva yvirraskilsið í ár. Undan kappingini varð sagt, at HB at kalla fór undir eina langtíðarætlan, har tosið um gull og heiður mátti bíða í nøkur ár.

Nógvu ungu leikararnir hava tó tikið skjótt við læru, og eftir nakrar stigamissir tíðliga í kappingini, hevur gingið sum eftir ánnin hjá nýskipaða HB liðnum. Ja, somikið væl, at teir nú teljast millum heitastu biðlarnar til FM-gullið.

**Torfør uppgáva**

Hetta er tó als ikki nakað, sum teir vilja tosa hart um í HB húsinum.

- Vit taka ein dyst í senn, men í longdini er gullið sjálvandi onkustaðni í høvdinum, men tað tosa vit so slettis ikki um. Hetta sigur Rúni Nolsøe, sum aftur í ár er liðskipari hjá havnarmonnunum.

Longu nú eru fólk farin at tosa um dystin á Toftum um eina góða viku, men hetta vil liðskiparin als ikki hoyra talan um.

- Eg eri fullvísur í, at uppgávan hjá okkum sunnudagin verður minst líka torfør, og tí eigur hon at takast í størsta álvara. GÍ hevur ofta staðið seg væl í Gundadali, og tað ætla teir sær helst eisini at gera í ár, heldur altso Rúni.

Til dystin hevur HB annars allar leikarar tøkar. Eingi kort vórðu havd á lofti, tá oddadystur varð leiktur í Vági, og skaðar hevur heldur ikki verið talan um. Florin var leikbannaður ta ferðina, men nú er hann eisini tøkur aftur, og so er spurningurin, hvussu HB venjarin fer at blanda sær kortini hesu ferð.

**GÍ kann avgera FM**

Gøtumenn hava ikki sama trýstið á sær, sum HB leikararnir hava. Teir hava longu tryggjað sær atgongumerki til komandi europeisku kappingarnar, og í landskappingini er teirra leiklutur at kalla útspældur.

Tó ikki meira enn so, at teir eftir øllum at døma koma at hava ein týðandi leiklut, tá avgerðin um FM-heitið skal takast.

GÍ skal nevnliga royna seg móti øllum trimum gullbiðlunum, og kenna vit gøtumenn rætt, er einki at taka seg aftur í, at teir í øllum hesum dystum ætla at geva alt tað teir orka.

Til dystin móti HB tykist einasta ivamálið at vera Jóan Petur Olsen, sum hevur drigist við ein skaða. Hóskvøldið var framvegis ikki greitt, um hann fær spælt við.

Helgi L. Petersen er leikbannaður, eftir at gulu kort hansara eru vorðin ov nógv í tali, men vanliga sendir Johan Nielsen ellivu mans á vøllin, og tað ger hann allar helst eisini hesu ferð.

**Støðan, 1. deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 | 14 | 10 - 0 - 4 | 38 | 23 | 15 | 30 |
| 2 | HB | 14 | 9 - 3 - 2 | 29 | 17 | 12 | 30 |
| 3 | VB | 14 | 8 - 4 - 2 | 25 | 18 | 7 | 28 |
| 4 | B36 | 14 | 8 - 0 - 6 | 40 | 21 | 19 | 24 |
| 5 | NSÍ | 14 | 6 - 3 - 5 | 32 | 22 | 10 | 21 |
| 6 | KÍ | 14 | 6 - 2 - 6 | 30 | 19 | 11 | 20 |
| 7 | GÍ | 14 | 6 - 2 - 6 | 27 | 26 | 1 | 20 |
| 8 | B71 | 14 | 3 - 2 - 9 | 19 | 27 | -8 | 11 |
| 9 | Sumba | 14 | 3 - 0 -11 | 11 | 56 | -45 | 9 |
| 10 | FS Vágar | 14 | 2 - 2 -10 | 15 | 37 | -22 | 8 |

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

***www.sosialurin.fo***



*Hóast flogið hevur verið gott higartil í ár, so tekur VB venjarin dystin móti niðurflytingarhótt vágamonnunum í stórum álvara*

## VB hugsar bara um sunnudagin

*Vágamenn, sum av álvara kenna seg hóttar av niðurflyting, skuldu fara suður longu í gjárkvøldið*

Tað stendur heilt nógv upp á spæl, tá vágbingar seinnapartin í morgin fáa vitjan av vágamonnum. Um dreymurin hjá vágbingum um fyrsta FM heitið framvegis skal hava møguleika at gerast til veruleika, so skulu teir vinna. Um dreymurin hjá FSV um framvegias at hava møguleika at spæla í bestu deildini skal gerast til meiri enn ein dreymur, so skulu teir í hvussu so er hava eitt stig.

– Vandin er sjálvandi, at tað er lætt at undirmeta eitt botnlið, men tað vóni eg ikki, at vit fara at gera, og eg rokni heldur ikki við tí. Vit minnast allir, hvussu torført tað var, tá vit fyrr í ár vóru í Sørvági. Dysturin endaði 2–2, men vit vóru hepnir at javna í síðstu løtu. Ta ferðina spældu vit ikki væl, sigur Krzysztof Popczynski, spælandi venjarin hjá VB.

Hetta er fyrsta ferðin, at VB er so tætt FM heitinum. Heldur tú, at tað er vandi fyri gummibeinum?

– Vit royna at útiloka hugsanina um medaljurnar og meistaraskapin. Vit taka bara ein dyst í senn.

Hesa ferð snýr tað seg um FS Vágar. Um tað eydnast, so vita vit, at tríggjar aðrar torførar uppgávur bíða okkum, áðrenn tað verður greitt, hvørja endastøðu vit fara at røkka.

Hjá vágbingum, sum hóskvøldið vandu í høllini á Vágseiði, eru allir spælararnir tøkir.

**Tað brennur undir FSV**

Í Vágum ásanna teir, at avrikið ímóti sumbingum var alt annað enn gott. Teir siga seg kortini ikki hava mist mótið. Longu í gjárkvøldið var ætlanin at fara suður til Vágs at fyrireika seg til dystin í morgin.

Allir spælararnir hjá FSV eru tøkir uttan Tór–Ingar Axelsen. Ungi maðurin, sum Jógvan Martin Olsen fyri trimum vikum síðani nevndi at vera eitt av nýggju landsliðsevnunum, er framvegis plágaður av skaða.

Í 1997 vann VB 4–1 á FSV á Vágseiði. Í 1996 var úrslitið 2–0 og í 1995 var úrslitið hjá Sumba/VB á heimavølli ímóti FSV 2–2.

JH

gult cyan magenta svart



# Bæði hava nakað at prógva

*Tá KÍ og B36 fara á vøllin í morgin, er tað fyrst og fremst æran, sum stendur upp á spæl. Gullmerkini munnu tey í øllum førum hava avskrivað*



*B36 skuldi heldur hugsað um at stríðast, tá B71 vitjaði teir. Sunnudagin verða stigini so í Klaksvík, sigur KÍ venjarin, Tomislav Sivic*

JÁKUP MØRK

Seinnu árini hava tað ofta verið dystir, við avgerandi týdningi fyri oddastríðið, tá KÍ og B36 hava tørnað saman.

Soleiðis verður ikki í ár, og uttan at skula fara ov nógv í smálutir um hví og hvussu, kann helst staðfestast, at hjá hvørgum av liðunum hevur árið gingið eftir vild.

**Fara at stríðast**

Jens Kristian Hansen, liðskiparin á B36 liðnum sigur, at B36 hevur alt fólkið tókt til dystin. Tað vil tó siga tann parturin, sum enn er at finna í landinnum.

Síðani felagið fyri góðari viku síðani segði farvæl við Pelle Andersson, hevur Piotr Krakowski staðið á odda fyri venjingini, og bæði hugburður og uppmøting hava verið góð.

Jens Kristian ásannar, at hópurin sjálvandi er viknaður nakað á pappírinum, nú tríggir leikarar eru farnir burturav, men hinvegin leggur hann dent á, at teir, sum eftir eru, hava nakað at stríðast fyri.

- Vit síggja nógv fram til dystin, og vit fara so avgjørt til Klaksvíkar fyri at stríðast fyri okkara møguleika, sigur ein avgjørdur liðskipari.

Hann ivast ikki í, at talan verður um ein tættan dyst, har viljin hjá liðunum báðum fer at hava sera nógv at siga.

**Stigini fara ongan veg**

Venjari hjá B36 tey trý seinastu árini hevur verið Tomislav Sivic, men í ár er hann venjari hjá KÍ.

Hann sigur, at eingin leikari er forðaður av skaðum, men hinvegin hevur KÍ ikki færri enn trý leikbann at stríðast við sunnudagin. Hóast missurin av Rógva Jacobsen, Ova Nysted og Símun W. Høgnesen sjálvsagt hevur sítt at siga, so hevur Tomislav góðar vónir til dystin sunnudagin. Hann heldur, at hugurin at venja framvegis er góður hjá leikarunum, og satt at siga ivast hann ikki í, at KÍ fer at vinna dystin sunnudagin.

- Tað kann væl vera, at B36 ætlar sær at stríðast, men tað haldi eg teir heldur skuldu gjørt, tá B71 var á vitjan hjá teimum. Tey trý stigini sunnudagin verða undir øllum umstøðum verandi í Klaksvík, er heilsan hansara til árstalsfelagið undan uppgerðini.

# Sumbingar ætla at tryggja seg

*Men so skulu teir gera enda á hagtølunum, sum siga, at teir ongantíð hava fingið stig á Sandi*

Sumbingar styrktu nógv um sína støðu í botninum, tá teir næstseinasta sunnudag fóru úr Vágum við øllum trimum stigunum.

Nú skal Sumba aftur spæla ímóti einum liði úr lægra endanum. Sumbingar skulu til Sands, har teir avgjørt rokna við størri mótstøðu, enn teir fingu í Vágum. Sumbingar eru framvegis í niðurflytingarvanda. Tað eru sandoyingar eisini. Tí kann roknast við einum tøttum dysti, og tað er neyvan sannlíkt, at málini fara at verða so ógvuliga mong.

Sumba hevur ongantíð fingið stig á Sandi. Møguleikarnir hava heldur ikki verið so nógvir. Tá Sumba í 1991 var í 1. deild, var B71 í 2. deild. Í fjør vann B71 2–1, og í 1995 vann B71 5–1 á Sumba/VB.

Úr Sumba frætta vit, at so at siga allir teir somu eru tøkir, sum vóru við í Sørvági. Tá vit fregnaðust, roknaðu teir ikki við, at Dánial Johan Joensen verður við. Hann arbeiðir í Danmark. Tá Sumba var í Vágum kom hann úr Danmark fyrrapartin, og fór niður aftur beinanvegin, tá dysturin var liðugur. Páll Magnar Kjærbæk hevur vant eitt sindur. Hann var ikki við í Sørvági, og hann verður heldur ikki við í morgin. Nicola Biberdzic hevur verið smáskaddur. Hann hevur vant fyri seg sjálvan, og teir rokna við, at hann verður við í morgin.



*Fær Sumba stig við sær av Sandi, eru góð líkindi fyri framhaldandi tilveru í bestu deildini*

Onkrir sumbingar hava ta seinastu tíðina mist okkurt venjingarkvøldið. Teir hava rokast við nátar. Tað halda teir er ein partur av bygdarlívinum, sum – um tað er neyðugt – skal takast framum fótbóltin.

**Eitt leikbann**

Á Sandi halda teir seg vera hampuliga væl fyri at taka ímóti Sumba. Sandoyingar ásanna, at tað hevði komið sera væl við at fingið trý stig. So hevði niðurflytingarspøkilsið av álvara verið manað í jørðina – í hvussu so er fyri í ár.

Jón Brekku er leikbannaður, tí hann fekk reytt kort, tá teir í Gundadali vunnu ímóti B36. Síðani næstsíðsta sunnudag hava sandoyingar verið vitni til skriviborðs telving um stigini, sum teir vunnu á vøllinum. Teir hava ikki verið partur í málinum, men teir hava vitað, at endaliga avgerðin fór at hava árin á støðuna hjá teimum. Nú er tað greitt, at stigini fara ongan veg. Spurningurin er, um fleiri koma á kontoina í morgin.

JH




Til landsdyst í Zürich

**Sveis - Føroyar**

**Beinleiðis úr Vágum**

**Stuðlið landsliðnum og njótið harafturat 9 dagar í bergtakandi landinum, frá 4. til 12. okt.**

**Fráferð:** Beinleiðis úr Vágum til Zürich tann 4/10 kl. 17.30
**Heimaftur:** Beinleiðis úr Zürich í Vágar tann 12/10 kl. 21.45

**Gisting:** Gist verður í 9 dagar/8 nætur í Sveis, møguleiki er at velja ímillum 2 trístjørnað hotell mitt í gamla býnum.

**Útferðir:** Skipað verður eisini fyri útferðum (ikki íroknað prísin)

Kostnaður:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hotel Scheuble | fyri hvønn á einkultkamari | kr. | 9.550,- |
| Hotel Scheuble | fyri hvønn á dupultkamari | kr. | 7.735,- |
| Hotel Adler | fyri hvønn á einkultkamari | kr. | 8.590,- |
| Hotel Adler | fyri hvønn á dupultkamari | kr. | 7.100,- |

**Íroknað prísin er:** Flogferð, gisting við morgunmati, bussflutningur frá flogvølli til hotell og aftur, bussflutningur frá hotell til stadion og aftur, atgongumerki til dystin og ferðaavgjøld.

Seinasta freist at tekna seg er 4/9-2000

Atlantic Airways
tel 333 900 • fax 333380

SANSIR